# Broyta ikki avgerð hjá oljufeløgum

**Landsstýrið ætlar sær ikki at leggja seg út í avgerðina hjá oljufeløgunum um, hvar oljuútgerðarhavnin skal liggja**

ÚTGERÐARHAVN
*Jan Müller*

Á samgongufundi í Tinganesi hósdagin varð avgjørt at taka avgerðina hjá oljufeløgunum til eftirtektar, um at antin Havnin og Runavík verður oljuútgerðarhavn í leitiskeiðnum.


*Drelnes*

Drelnes í Suðuroy varð triðja alternativið men varð vrakað í prekvalifiseringini. Tað merkir, at tað verður eingin politisk uppílegging, soleiðis sum tað annars sá út til eina løtu. Tjóðveldisflokkurin, sum í tíðindaskrivi legði rættiliga hart út móti avgerðini hjá oljufeløgunum og vildi hava samgongufund um málið, setti seg ikki upp ímóti avgerðini, tá avtornaði. Tað merkir, at arbeiðið hjá Statoil og hinum oljufeløgunum fer at ganga sum ætlað. Feløgini, sum bjóða, skulu lata tilboð sítt inn áðrenn 27. januar, og longu 1. mars verður avgjørt, hvat av feløgunum fær sáttmálan um allar tænastur í sambandi við komandi leiting.

Tað stóðst annars rættiligt orðaskifti av avgerðini hjá oljufeløgunum ikki at góðkenna Drelnes. Fleiri av flokkunum komu við yvirlýsingum. Javnaðarflokkurin segði seg vilja taka málið upp í tinginum, meðan Tjóðveldisflokkurin vildi taka tað upp í samgonguni. Flokkurin tók rættiliga dýran til í tíðindaskrivi og metti at oljufeløgini høvdu avskrivað Suðuroynna og vildi hann tí hava landsstýrið at geva feløgunum boð um, uttan mun til hvat útgerðarfelag tey professionelt mettu sum tað besta, at virkisemi í sambandi við komandi leiting skal vera í Suðuroynni.

Fundurin hósdagin endaði tó við eini semju millum landsstýrisflokkarnar, og eftir fundin í samgonguni kundi Eyðun Elttør, landsstýrismaður í Sjónvarp Føroya staðfesta, at oljuhavnin verður antin í Havn ella í Runavík. Hann váttaði somuleiðis, at oljuhavnin kemur ikki at liggja í Suðuroynni, men hann vildi gera sítt til at medvirka til, at virksemi frá oljuvinnuni verður í Suðuroynni eisini. Tað er annars eitt krav til feløgini, sum geva boð uppá oljuútgerðarvirksemið, at oljudálkingarútgerð ol. skal liggja í Suðuroynni.

Eftir fundin hósdagin segði Sámal Petur í Grund, tingmaður fyri Sjálvstýrisflokkin við ÚF, at man kann ikki geva oljuvinnuni nakrar fortreytir og so seinni taka tær somu fortreytirnar frá teimum aftur. -Tað oljufeløgini hava valt, verður tikið til eftirtektar. At tað stendur í lógini, at virksemi skal leggjast til útjaðaran merkir ikki, at oljuútgerðarhavnin skal liggja í útjaðaranum. Tað eru nógvir aðrir møguleikar har útjaðarin kann fáa sín part av virkseminum sigur Sámal Petur í Grund við Útvarpið.

Høgni Hoydal formaður Tjóðveldisfloksins segði í stuttari viðmerking við Útvarpið eftir fundin hósdagin, at flokkurin vil ikki leggja seg út í, hvar oljuútgerðarhavnin liggur, men flokkurin vil hava vissu fyri, at virksemi eisini verður í útjaðaranum, serliga kanska í Suðuroynni sum hann málbar seg.


*Sámal Petur í Grund*


GRAMEX

Útgjalding úr Gramex-grunninum

Heitt verður á øll, ið framleiða føroyskar plátur, bond og ljómfløgur, um at senda skjalprógvað tilfar um, hvussu nógvar eindir av LP/MC/CD hvør einstakur framleiðari ella virki hevur framleitt í tíðarskeiðnum 01.01.2000 til 31.12.2000.
Upplýsingarnar kunnu vera váttan frá veitaranum um, hvussu nógvar eindir av hvørjum verki eru gjørdar. Avrit av fakturum yvir eindirnar kunnu eisini góðtakast.



Eru ivamál hesum viðvíkjandi, kunnu tit ringja til:
Gissur Patursson
Tlf. 319820 / 213535, fax 314955
Kristian Blak,
Tlf. 314815 / 225034, fax 314825
Hans Pauli Torgarð
Tlf. 312043 / 221638, fax 318617

Mannagongdin er síðani, at allar eindirnar verða taldar saman í stigum, ið so verða nýtt, tá samlaða upphæddin frá GRAMEX skal býtast.

Sjálv útgjaldingin verður í feb/mars 2001

Alt tilfar skal sendast til:
Framleiðslufelagið • Postboks 1057 • FO-110 Tórshavn



Minnist til hesar váttanir:
1. Váttan um framleiddar eindir
2. Avrit av faktura
3. Váttan frá studio um tal av eindum ella tvítøkum

Seinasta freist fyri innlating er 1. februar 2001




# Fíggjarmálaráðharrin kannar samstarvstrupulleikar

**Samstarvstrupulleikarnir á tolleftirlitinum á flogvøllinum í Vágunum, sum hava havt við sær, at ferðafólk ikki verða kannað í sama mun sum fyrr, koma nú undir sjóneykuna hjá landsstýrismanninum við fíggjarmálum.**

RÚNAR REISTRUP
*Tolleftirlit*

Tíðindini sum hósdagin bórust um at trupulleikar eru í samstarvinum millum leiðslu og tollarar á tolleftirlitinum á flogvøllinum koma ikki heilt óvart á landsstýrismannin í fíggjarmálum, Karsten Hansen, ið millum annað hevur Toll- & Skattstovuna undir sær. Hann hevur fyrr hoyrt um hesar.

Men at trupulleikarnir hava havt við sær, at tolleftirlitið á flogvøllinum nú liggur at kalla lamið, kann landsstýrismaðurin ikki liva við, og hann fer tískil nú undir at kanna, hvussu álvarsamir samstarvstrupulleikarnir eru, og um hesir veruliga hava viknað um tolleftirlitið.

– Eg havi fyrr hoyrt okkurt um at tey hava havt trupulleikar á Tolleftirlitinum á flogvøllinum, men tað er ikki mín uppgáva sum landsstýrismaður at loysa innanhýsis ósemjur á einum stovni sum Toll- & Skattstovuni. Men tá nú hesir trupulleikar ikki eru loystir enn, ætli eg mær at spyrja meg fyri hjá Toll- & Skattstovuni.

Landsstýrismaðurin sóknast tó, eins og stjórin á Toll- & Skattstovuni gjørdi í blaðnum herfyri, eftir eini fráboðan um samstarvstrupulleikarnar á flogvøllinum.

– Um eingin ger vart við seg og fer til leiðsluna og sigur hvussu er, so er ógvuliga ringt at taka málið upp, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum.

Samstarvstrupulleikarnir á tolleftirlitinum í Vágunum versnaðu ímóti endanum á árinum í fjør, tá tollararnir mettu seg fáa so mikið ógreið boð frá leiðsluni, um hvør framferðarháttur kundi góðtakast, tá ferðafólk vórðu kannað, at teir valdu at minka mundandi um talið av stakroyndum, ið gjørdar verða av ferðafólki.

# Ein søt grape

TÓNLEIKUR
*Rúnar Reistrup*




»Gloymska við grape« kallast nýggjasta fløgan á føroyska fløgumarknaðinum, ið Unn Patursson og Rógvi á Rógvu eiga við húð og hár.

Heldur løgna men tó sigandi heitið gevur kanska fløguna út fyri at vera eitt sindur beiska, men tað er hon ikki. Hetta er tann eitt sindur barnakenda og sera sjarmerandi røddin hjá Unn Patursson heilt einfalt ov søt til.

Tekstirnir, ið Unn hevur skrivað teir allar flestu av, snúgva seg um kærleika, og tí er beiskleiki og grapesmakkur sjálvsagt eitt gjøgnumgangandi tema tann tíman tað tekur fløguspælaranum at eta seg ígjøgnum fløguna. Men sum við góðum mati ella einum vælblandaðum drinki vinnur beiskleikin ongantíð á hinum smakkunum.

## Góð ljóðgóðska

Hóast tað hetta farna árið er blivið styttri millum tær góðu føroysku fløgurnar og longri millum tær vánaligu, hoyrir bróðurparturin av føroyskum fløguútgávum kortini enn til tann seinna bólkin.

»Gloymska við grape« hoyrir heima í tí fyrra.

Ljóðgóðskan er góð, teksturin fyri tað mesta sigandi, og tónleikurin er til tíðir spennandi og sera væl útsettur og spældur.

Rógvi á Rógvu hevur staðið fyri at samla tónleikarar til fløguinnspælingina og hevur ikki latið sær lynda við tí næstbesta. Gamla Plúmm manningin, sum Rógvi sjálvur er ein partur av, gongur aftur ígjøgnum alla fløguna, og harafturat hava so ein væl mannað røð av øðrum góðum og kendum tónleikarum sett sítt merki á tónleikin.

## Á veg í tvey ár

Tá »Gloymska við grape« kom út í handlarnar fyrr í hesi vikuni, lá tvey ára langt arbeiði hjá Unn og Rógva handan hana. Tey hava gjørt alt frá upptøkum, løgum og orðum til fløguhúsa og plátufelag sjálvi, og tað hevur tikið sína tíð. Eitt sindur ov langa tíð sambært Rógva á Rógvu.

– Vit ætlaðu at fáa fløguna út seint farna summar, men tað gekk ikki. So skuldi hon koma út í november, men tað gekk heldur ikki. Tann seinasta deadline, sum vit ikki kláraðu at halda, var vikuna undan jólum. Men nú er hon so her, og vit eru væl nøgd við hana, sigur Rógvi á Rógvu.

Rógvi á Rógvu er kendur frá so at siga øllum størri plátu- og fløguútgávum í Føroyum í nýggjari tíð, og Unn Patursson hevur fyrr verið við á útgávum hjá Enekk, Haldurs Café og Útvarpi Føroya, so tað at innspæla eina fløgu var ikki júst nýtt fyri teimum.

– Men tað hevur verið stuttligt at roynt sjálvi at standa fyri øllum síðunum av útgávuarbeiðinum, sigur Rógvi á Rógvu.

Fløgan er givin av plátufelagnum Run Records, sum hóast altjóða klingandi navnið ikki er eitt heimsumfatandi amerikanskt plátufelag, men Unn og Rógvasa egna lítla útgevarafelag.


-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

| | |
|---|---|
| **TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUTOMATIK** Skrás.: 28-06-96 Km.: 78.000 Prísur: 165.600,- Garanti* | **TOYOTA COROLLA 1,3 GLS H/B** Skrás.: 16-10-97 Km.: 57.000 Prísur: 98.600,- Garanti* |
| **TOYOTA CAMRY 2,0 Gli** Skrás.: 10-07-91 Km.: 129.000 Prísur: 69.600,- Sýnaður 10-00 | **SSANGYONFG MUSSO 4X4** Skrás.: 18-12-97 Km.: 43.000 Prísur: 187.600,- Garanti* |
| **TOYOTA CARINA E 2,0 Gli SEDAN** Skrás.: 24-08-95 Km.: 112.000 Prísur: 110.600,- Garanti* | **VOLVO 460 SEDAN** Skrás.: 25-05-90 Km.: 92.000 Prísur: 48.600,- Sýnaður 06-99 |
| **TOYOTA CARINA 1,6 Xli L/B** Skrás.: 23-04-96 Km.: 52.000 Prísur: 108.600,- Garanti* | **VW POLO 1,9 TDI STATION** Skrás.: 14-04-00 Km.: 11.000 Prísur: 149.600,- Garanti* |
| **TOYOTA CARINA E 1,6 CDX** Skrás.: 18-10-96 Km.: 77.000 Prísur: 103.600,- Garanti* | **HONDA ACCORD 1,8** Skrás.: 01-11-97 Km.: 53.000 Prísur: 136.600,- Garanti* |
| **TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN** Skrás.: 30-05-94 Km.: 109.000 Prísur: 89.600,- Garanti* Sýnaður 03-00 | **PEUGEOT 405 1,9 T-DIESEL** Skrás.: 10-01-96 Km.: 80.000 Prísur: 138.600,- Garanti* Sýnaður 09-00 |
| **TOYOTA CARINA 1,6 Xli** Skrás.: 11-06-91 Km.: 108.000 Prísur: 48.600,- Sýnaður 09-00 | **OPEL ASTRA 1,7 TURBO DIESEL** Skrás.: 31-07-96 Km.: 105.000 Prísur: 89.600,- Garanti* |
| **TOYOTA CARINA 1,6 GL** Skrás.: 07-10-88 Km.: 208.000 Prísur: 42.600,- Sýnaður 05-00 | **OPEL ASTRA 1,6 I STW.** Skrás.: 03-11-97 Km.: 35.000 Prísur: 110.600,- Garanti* |
| **TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL** Skrás.: 30-08-95 Km.: 151.000 Prísur: 100.600,- Garanti* Sýnaður 01-00 | **HYUANDAI ACCENT 1,5** Skrás.: 02-01-98 Km.: 25.000 Prísur: 79.600,- Garanti* |
| **TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA LB** Skrás.: 11-08-98 Km.:17.000 Prísur: 132.600,- Garanti** | **FORD MONDEO TURBO DIESEL** Skrás.: 01-09-99 Km.: 44.000 Prísur: 142.600,- Garanti* |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA L/B** Skrás.: 30-09-98 Km.: 52.000 Prísur: 115.600,- Garanti** | **FORD ESCORT 1,6** Skrás.: 22-09-95 Km.: 87.000 Prísur: 74.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 SEDAN** Skrás.: 05-03-99 Km.: 34.000 Prísur: 117.600,- Garanti** | **FORD ESCORT 1,6 5 HURÐAR** Skrás.: 06-06-95 Km.: 82.000 Prísur: 65.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 H/B G6** Skrás.: 19-11-98 Km.: 15.000 Prísur: 124.600,-Garanti** | **FORD ESCORT 1,8 SPORT** Skrás.: 01-08-95 Km.: 43.000 Prísur: 74.600,- Sýnaður 12-00 |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 H/B** Skrás.: 20-04-99 Km.: 7.000 Prísur: 114.600,- Garanti** | **CITROEN BX DIESEL** Skrás.: 01-11-88 Km.: Prísur: 35.600,- |

Sosialurin - 311820

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN.
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrsta skrásetingar dato.

VØRUVOGNAR

| | |
|---|---|
| **TOYOTA HILUX 4x2 PICK-UP** Skrás.: 28-08-90 Km.: 205.000 Prísur: 46.600,- | **NISSAN KING VAN** Skrás.: 29-09-95 Km.: 85.000 Prísur: 80.600,- Garanti* |
| **MERCEDES BENZ VITO VAN** Skrás.: 23-06-98 Km.: 50.000 Prísur: 148.600,- Garanti* | **MAZDA B-2500 PICK-UP DIESEL** Skrás.: 11-05-00 Km.: 9.000 Prísur: 128.600,- Garanti* |

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-fri. 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040